# NIK & JAY ERU HEITARI ENN NAKRANTÍÐ

**Teir kulu jassarnir Nik & Jay bjóða til ársins poppveitslu á Vágsbøi. Teir eru frískir, frekir og fegnir um at sleppa til Føroya at spæla. Í viðførinum hava teir eitt stórt savn av hittum, sum kunnu fáa eina og hvørja áskoðarafjøld at kóka**

Uppskriftin er í grundini rímiliga einføld. Teir rappa frískt og frekt yvir nøkur góð beat, og so svinga teir seg upp í einum melodiøsum og fangandi niðurlagi. Men uppskriftin riggar – umaftur og umaftur.

Nik & Jay gera framúr popptónleik, sum tey ungu taka til sín, goyma, brúka og virðismeta. Og tey, sum fyri nøkrum árum síðani hildu, at Nik & Jay vóru eitt smart upplop, sum ikki fór at halda, mugu trúgva umaftur. Stór virðing er um Nik & Jay eftir fleiri ár við støðugum hittum, og í longdini hevur teirra tónleikur hildið betur, enn nakar hevði roknað við.

Og teir duga framvegis. Teir gera framvegis nýggjar sangir, hava nógvar á bakkastokki, og bæði teir og onnur vita, at tá ið teir tveita nakað út á marknaðin, so endar tað vanliga við einum ovasta plássi á hittlista. Eisini her í Føroyum hava Nik & Jay ferð eftir ferð verið at funnið ovarliga á 15 teimum bestu – og teir verða nógv spældir í útvarpi.

## Veitsla og innari friður

Nik & Jay vóru í Føroyum fyri nøkrum árum síðani og høvdu konsert. Tá vóru teir yngri og nýggjari á tónleikapallinum. Teir livdu lívið, sum skuldi tað livast her og nú, og soleiðis var eisini á ferðini í Føroyum.

- Tað eru jú nøkur ár síðani seinast, og vit vóru nakrir verri jassar tá. Eg minnist í øllum førum, at vit drukku alt ov nógv sunnukvøldið, og mánamorgunin endaði eg á einum studentaskúla; onkrum studentaskúla, sum lá tætt við hotellið. Har slapp eg at taka ein tíma og slapp at undirvísa einum flokki í geografi. Tað er tað kanska onkur sum minnist. Tað var stak hugnaligt, sigur Jay.

- Alt í alt var tað ein góð blanding av eini sjúkliga góðari veitslu og ótrúliga vakrari náttúru og innara friði, minnist Jay.

Nú er nógv vatn runnið í ánni, og Nik & Jay eru blivnir vaksnir og meira etableraðir sum tónleikarar. Og hóskvøldið spæla teir á Summar Festivalinum.

-Vit eru ótrúliga glaðir fyri, at tað kundi lata seg gera. Upprunaliga var tað nevniliga ætlanin, at vit skuldu spæla í Klaksvík fríggjakvøldið, men tað var flutt til hóskvøld, og tað eru vit fegnir um, tí leygarkvøldið skulu vit enda Skanderborg festivalin, og tað er nakað, sum vit altíð hava droymt um, sigur Nik.

So lunnar verða lagdir undir eina dreymakonsert á Skanderborg við einari rimmar framførslu á Summar Festivalinum.

## Neyðugt at hava steðgir av og á

Tað eru nú liðin sjey ár, síðani Nik & Jay fingu sítt fyrsta stóra gjøgnumbrot á danska tónleikapallinum, men hóast teir hava verið fulltíðartónleikarar so leingi, eru teir enn ikki vorðnir troyttir av tónleikaralívsstílinum.

- Vit syrgja fyri at halda nakrar neyðugar steðgir. Vit ferðast nógv og nýta nógva tíð uttanlands, ikki fyri at framføra, men fyri at gera nýggjan tónleik, slappa av og síggja okkurt nýtt, sigur Jay.

- Nú er tað eitt hálvt ár síðani vit seinast hava nortið eina mikrofon. Vit hava brúkt nógva tíð í upptøkuhølunum, so á tann hátt halda vit okkum í gongd allatíðina. Um vit høvdu spælt konsertir hvønn dag, so høvdu vit skjótt blivið troyttir, sigur hann.

Men umstøðurnar hjá Nik & Jay sum bólki eru eisini nógv broyttar hesi árini, og nú nýtast teir ikki at átaka sær alalr hugsandi uppgávur fyri at fáa tað at bera til.

- Tey fyrstu tvey árini vóru vit noyddir at arbeiða sera hart. Vit spældu onkuntíð 100 konsertir og gjørdu 100 samrøður uppá ein mánað, so tað var rættiliga strævið. Men tað nýtist okkum ikki at gera longur. Nú gera vit bara tað, sum vit sjálvir halda vera feitt, sigur Jay.

- Tað ger eisini, at vit nú kunnu brúka orkuna rætt og verða 100% klárir tá vit eru úti og spæla. Tað skal bara vera tað besta av tí besta, sigur hann.

Og tað besta av tí besta fáa føroyingar frá Nik & Jay hóskvøldið. Tað verður ein poppveitsla uttan sín líka.

## Øll kenna Nik & Jay

**Ein kanning, sum var gjørd herfyri, vísti, at 97% av øllum danskarum kenna til Nik & Jay. Og tað merkir eisini teirra gerandisdag, at teir eru vorðnir so kendir.**

**- Vit merkja at vit eru kendir, tí vit fáa viðmerkingar um, at fólk halda okkara tónleik vera feitan. Vit skriva autografar, fáa smíl og herðaklapp, og av og á eru tað eisini fólk, sum rópa okkurt negativt, men tað má man jú taka við, sigur Jay.**

**- Men tað eru sjálvandi eisini nøkur ting, sum eg ikki geri. Eg fari kanska ikki á Strøgið leygarmorgnar, tá tað eru flest fólk, ella seti meg í eitt shoppingcentur, tá tað er útsøla. Men samanumtikið er tað fyri tað mesta positivt at vera kendur, sigur Jay.**

**- Tað er ikki feitt at vera kendur bara fyri at vera kendur. Men tá fólk rópa á okkum á gøtuni, og siga, at okkara tónleikur er feitur, tá er tað gott. Ella tá fólk koma yvir til okkum og siga, at tey hava nýtt onkran av okkara sangum, tá tey blivu gift, tá er tað feitt. Tí tá hava vit fatur á tí rætta endanum, sigur Nik.**



## Joey Moe og Jinks verða við

Tað verða ikki bert Nik & Jay, sum fara á pallin á Summar Festivalinum. Tveir aðrir kendir danskir tónleikarar eru gestir til framførsluna í Klaksvík, og tað fer at gera konsertina enn meira spennandi.

Sangararnir Joey Moe og Jinks, sum báðir hava verið frammi í donskum tónleiki sum solistar seinnu árini, fara á pallin saman við Nik & Jay, og eisini verður DJ Morten Breum, sum verður roknaður sum besti plátuvendarin í Danmark í løtuni, við á pallinum.

Nik & Jay hava havt onkra einstaka framførslu við hesum gestum í Danmark, og tær hava riggað so væl, at tað verða fleiri av hesum framførslum í summar.